# MT OG HUGNI

bátastevna er, sum nú í Vestmanna leygardagin?

– Vit gleða okkum til samveruna, sum bátalívið gevur okkum og øðrum, sum eru við. Tað at hitta fólk, práta, skemta og hugna sær saman. Tað er hetta, sum er so stuttligt og gevandi við slíkari samveru.

Henge sigur, at tey hava eisini ein húsvogn, sum tey plaga at hava við í Vestmanna, tá bátastevna er, men hesaferð verða tað helst dóttir, versonur og abbabørn, sum fara at húsast í vogninum.

– Men tey koma tó við út í Vestmannasund og út undir Fútaklett, so tey kunnu verða við í siglingini inn á Vestmanna, leggur hann aftrat.

– Í fjør vóru Henge og Tóra ikki á bátafestivali á Toftum í báti, men í húsvogni.

– Húsvognurin er eisini ein fínur møguleiki til slíka samveru, sum ikki er so ólík henni, vit uppliva í bátunum, sigur Joen Hendrik Isaksen.

*vilmund@sosialurin.fo*






# Sjarman við bátasigling má ikki rúka

**LUKSUS – Í dag eru nógvir bátar so óluksáliga stórir, flottir og dýrir, at tú næstan følir teg illa at koma við einum báti, sum »bara« kostar eina hálva miljón. Hetta er eitt sindur keðiligt, tí fert tú at kappast við slíkar bátar, kann eitt slíkt frítíðarítriv skjótt gerast ein byrða, sigur Joen Hendrik Isaksen**

Vilmund Jacobsen

Joen Hendrik Isaksen og konan Tóra Isaksen í Kvívík brúka bátin, tey eiga, nógv til sigling um sumrarnar, og umfram at vitja á bátastevnum og øðrum stevnum kring um í Føroyum, hava tey eisini verið í Hetlandi saman, eins og tey hava verið tvær ferðir á bátaferð í Noregi.

– Ein slíkur bátur er ein so mikið stór íløga, at skalt tú fáa nakra gleði av henni, noyðist konan at vera við uppá tað. Soleiðis er hjá okkum. Vit hava bæði stóran áhuga í hesum ítrivi og ferðingar- og frítíðarhátti. Vit hava havt stóra gleði av bátasigling, bæði einsamøll eins og saman við familju, vinum og kenningum, sigur Joen Hendrik Isaksen, vanliga róptur Henge.

Hann vísir á, at uttanlandsferðirnar við bátinum eru tær bestu, tey nakrantíð hava havt.

## Dýrir bátar

Henge hevur tó eitt lítið hjartasuff, nú vit røða um frítíðarsigling, men hann leggur dent á, at suffið á ongan hátt luktar av øvundsjúku, og ei heldur er hetta á nakran hátt illa meint.

– Í dag eru nógvir bátar so óluksáliga stórir, flottir og dýrir, at tú næstan følir teg illa at koma við einum báti, sum »bara« kostar eina hálva miljón. Hetta er eitt sindur keðiligt, tí fert tú at kappast við slíkar bátar, kann eitt slíkt frítíðarítriv skjótt gerast ein byrða.

Bæði Henge og konan Tóra eru sera fegin um bátin, tey hava, tó at hesin ikki á nakran hátt kann samanberast við teir stóru og dýru bátarnar.

Hann ásannar kortini, at tá báturin hjá teimum liggur undir liðini á einum av teimum stóru og dýru bátunum, kann hesin skjótt minna um eini lítla jollu í samanburði við hin stóra.

## Sjarman fer

Henge slær kortini kalt vatn í blóðið.

– Vit føla okkum væl umborð á okkara báti, og tað er hetta, sum er avgerandi fyri okkum. Hinvegin er tað kanska eitt sindur um tað, sum onkur hevur sagt, at ein partur av sjarmuni við bátasigling kann skjótt rúka, um allir bátarnir gerast so stórir og flottir, at vanligu bátarnir púrasta detta burtur ímillum – og menn kanska skulu føla seg illa, sigur kvívíkingurin, Joen Hendrik Isaksen, sum saman við konu síni gleðir seg til bátafestivalin í Vestmanna leygardagin.

*vilmund@sosialurin.fo*